## Vil hava søgur úr Føroyum

Sum øll onnur stór fótbóltsfeløg í Evropa, so hevur Manchester City eisini eitt Museum/savn. Manchester City´s Museum heitir nú á øll viðhaldsfólkini, sum ferðast til Føroya, tað verið seg við flogfari, ferju ella fiskitrolara, um at skriva um sínar upplivingar frá Føroyaferðini. Ætlanin hjá Manchester City´s Museum er at savna allar søgurnar saman, so fólk kunnu minnast aftur á eina ta mest sjáldsomu ferðina Manchester City hevur gjørt í søgu sínari. Fólk skulu senda ein teldupost til tours@mcfc.co.uk og fortelja frá sínum upplivingum í Føroyum. Ein sjáldsom, men stuttlig áheitan. Savnið hjá Manchester City hevur yvir 3.000 lutir, og taka teir ímóti øllum lutum, sum hava nakað við felagið at gera. T.v.s. at verða prentaðir serligir minnislutir, t.d. turriklæði, har bæði EB/Streymur og Manchester City standa prentað á, so skal ein slíkur minnislutur eisini á savnið hjá Manchester City. Enn einaferð er staðfest, at fótbóltur veruliga gevur Føroyum nógva umtalu.



## Keflavík er á odda í Landsbankadeildini

Tað gongur væl hjá Keflavík í Landsbankadeildini. Í gjár spældu teir á útivølli ímóti Fram. Dysturin var spældur á Laugardalsvøllinum í Reykjavík. Væl hilnaðist hjá Keflavík. Keflavík vann 2-0, og skoraði Tórarinn Brynjar Kristjánson bæði málini. Málini fullu í 83. minutti, og í 90. minutti. Sigurin ber við sær oddasess til Keflavík, sum nú hevur 25 stig á kontuni. Símun Samuelsen var ikki við á liðnum hjá Keflavík. Hann var leikbannaður, nú hann hevur fingið fýra gul kort higar til hetta kappingarárið.

# ólti til WC-pappír

### Meistari við Derby

Árini 1967-1974 spældi Lee 248 dystir fyri Manchester City, og skoraði hann 112 mál. Lee fór til Derby County í august 1974. Millum annað skoraði Lee tíggju ferðir í dystum ímóti Manchester United, og var tað við til at gera hann eyka væl umtóktan millum viðhaldsfólkini.

Lee var ikki glaður um avgerðina hjá Manchester City, um at selja hann, og í desember hetta árið undirstrikaði hann hetta við at skora sigursmálið fyri Derby ímóti Manchester City. Fyri aðru ferð eydnaðist tað Lee at vinna enska meistaraheitið, og skoraði hann eisini javnan fyri Derby hetta kappingarárið. Tí kundi hann eisini taka ímóti enn einum meistaraheiðursmerki í maj 1975.

Næsta kappingarárið endaði Lee í einum roki, sum fólk í Bretlandi minnast væl. Verjuleikarin hjá Leeds, Norman Hunter, ákærdi Lee fyri at hava vunnið sær eitt brotsspark á óregluligan og ósømiligan hátt. Orðadrátturin millum Hunter og Lee førdi til sannan nevaleik, og endin var, at báðir vóru sendir av vøllinum. Seinni hevur blaðið "The Observer" valt hendan tilburðin til at verða tann mest minniliga útvísingin í ítróttarsøguni.

Millum 1968 og 1972 spældi Lee 27 landsdystir fyri Ongland, og skoraði hann tíggju mál í hesum landsdystunum. Í 1976 legði hann skógvarnar á hilluna. Í mun til aðrar fótbóltsspælarar gjørdist ikki talan um eina stagnasjón.

### WC-pappír

Lee fór í eina heldur sjáldsama vinnu. Hann byrjaði at framleiða WC-pappír, og hilnaðist somikið væl, at hann skjótt gjørdist millum ríkastu menn. Millum manna var hann nevndur "Bog Roll King" – WC-pappírskongurin.

Lee gjørdist eisini kendur, sum kappingarhesta-venjari. Her eydnaðist tað Lee at venja nakrar hestar, sum gjørdu tað gott á kappingarbreytunum. Onglendingar minnast Harry Hardmann, Allwight Then og Young Jason, sum góðar kappingarhestar. Í 2001 gavst Lee tó at fáast við kappingarhestar.

### Formaður í City

Sjálvt um Lee eisini spældi við Bolton og Derby, so var Manchester City altíð liðið, sum honum dámdi best.

Í 1994 keypti hann partabrøv fyri 3 miljónir bretsk pund. Hetta førdi til, at hann gjørdist formaður í felagnum. Men tíðin sum formaður í Manchester City gjørdist ikki líka eydnurík, sum tíðin hann hevði, sum spælari í felagnum. Millum mistøkini Lee gjørdi var at seta Alan Ball í starv sum venjara. Tað gekk galið longu fyrsta árið, og Manchester City flutti niður. Niall Quinn, Keith Curle og Garry Flitcroft rýmdi úr spælarahópinum, og alt fór í hundannar hjá City.

Lee tók seg aftur sum formann í 1998, og tá var Manchester City farið skramblandi niður í triðjubestu fótbóltsdeildina.

Fyrstu árini helt hann fram, sum partaeigari, men hann valdi síðani at selja síni partabrøv til thailendska ríkmannin, Thaksin Shinawatra, sum eigur Manchester City við húð og hárum í dag.

4. juni í 2005 endaði Franny Lee í geglinum aftaná ein harðan orðadrátt við ein løgreglumann. Hetta hendi tá løgreglumaðurin vildi gera eina alkoholroynd, fyri at kanna um kona Franny Lee, Gill hevði ov nógv alkohol í blóðinum, tá hon koyrdi heim við bili sínum.

Manchester City viðhaldsfólk minnast ívið formannin Franny Lee við gleði, men álopsspælaran Franny Lee minnast tey við stórari gleði. Vánaligu avrikini á skrivstovuni klára ikki at yvirskugga góðu avrikini á fótbóltsvøllinum. Og lítil ivi er um, at Franny Lee situr og hyggur í sjónvarp, tá EB/Streymur tekur ímóti Manchester City á Tórsvølli hóskvøldið.



*Francis Henry Lee roynir seg við skoti í dystinum, men Ongland tapti 0-1*

*Mynd: Polfoto*

## Nýtt blað í NSÍ søguni

**Ferðalagið er ikki stórt hjá NSÍ, sum í morgin fyri fyrstu ferð nakrantíð fer at taka lut í fyrsta undanumfarinum í europeisku kappingini fyri meistaralið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lagið var gott í NSÍ ferðalagnum, sum leygardagin fór úr Vágum, og sunnukvøldið ella tíðliga mánamorgunin, tá ið ferðalagið var komið til Tbilisi í Georgia var lagið uppaftur betri.

Hóskvøldið vann NSÍ týdningarmiklan landskappingardyst ímóti HB, og sunnudagin tóku meistararnir enn eitt fet ímóti oddasessinum, tá ið B36 vann ímóti oddaliðnum EB/Streymi.

NSÍ ferðalagið gisti í Keypmannahavn sunnunáttina. Fyrrapartin sunnudagin varð flogið til Riga, har føroyska ferðalagið bíðaði til tíðliga á kvøldinum. So varð flogið til Georgia, har NSÍ í morgin klokkan 18 lokala tíð, sum er klokkan 16 føroyska tíð fyri fyrstu ferð nakrantíð skal royna seg í undanumfarinum í europeisku meistarakappingini.

Úr Georgia verður sagt, at gistingarhúsið er gott, og at umstøðurnar annars eru so øðrvísi, sum tað varð roknað við. Hitastigini eru omanfyri tredivu, og tá ið dysturin verður spældur klokkan 18 lokala tíð, verður tað strævið hjá NSÍ.

NSÍ ferðalagið í Georgia er ikki stórt. Har eru fjúrtan spælarar og so nakrir fáir hjálparar. Venjarin, Johan Nielsen, er ikki við í Georgia, so tað er Pauli Poulsen, hjálparvenjari, ið hevur ábyrgdina av liðnum. Nýggi vongverjin, Jónas Tór Næs, er orsaka av skaða ikki við.

Spælararnir eru hesir: Tórður Thomsen, Aco Pandurovic, Filip Jacobsen, Einar Hansen, Pól Jóhannus Justinussen, Jóhan Troest Davidsen, Óli Hansen, Bogi Løkin, Nenad Stankovic, Milan Pejcic, Sjúrður Jacobsen, Hjalgrím Elttør, Karoly Potemkin og Øssur Dalbúð.

### Dygg mótstøða

FC Dinamo Tbilisi er ivaleysa sterkt mótstøðulið hjá NSÍ, eisini hóast teir eru í summarfrí frá landskappingini. NSÍ heimasíðan veit at siga, at liðið júst nú hevur verið á venjingarlegu í Týsklandi.

Á liðnum eru nógvir spælarar, sum hava altjóða royndir. Tveir landsliðsspælarar úr Gabon eru við, og fleiri, sum hava spælt á georgiska landsliðnum. Tá ið Georgia 31. mai tapti 2-0 ímóti Portugal, átti FC Dinamo Tbilisi tveir spælarar á liðnum. Tá ið U21 landsliðið 25. mars vann 4-0 á Litava, vóru tveir spælarar úr felagnum á liðnum. Hesir eru nú báðir í a-landsliðshópinum. Umframt hesar hava tríggir aðrir áður verið á landsliðnum.

FC Dinamo Tbilisi vann meistaraskapin rættiliga sannførandi. Teir taptu bara tveir dystir, spældu ein javnan og vunnu hinar 23. Við kappingarlok vóru teir tíggju stig fram anfyri nummar tvey. Síðani Sovjetsamveldið datt sundur, hava teir í Georgia skipað fyri sínari egnu landskappingi. Hon hevur verið síðani 1990, og FC Dinamo Tbilisi hevur verið meistari tíggju ferðir!

Í altjóða høpi var tindurin, tá ið FC Dinamo Tbilisi í 1981 vann finaluna í kappingini fyri europeiskar steypavinnarar.